# Meistarligi Hanus

**Fólkakæri vísusangarin Hanus G. Johansen er ein meistari á pallinum, og tað hevur einki at siga, um hann spælir fyri ungum ella gomlum. Hann dugir at fanga eina áhoyrarafjøld við sínum framúr sangum**



Hanus G. Johansen er okkara fremsti vísusangari – fólkakærur og hugtakandi, tá ið hann fer á pallin við gittaranum hjá sær

Hanus G. Johansen er helst fremsti føroyski vísusangarin, og hann hevur síðani ungdómsárini spælt og sungið fyri fólki.

Fyrstu árini var tað meira á gøtunum í Klaksvík, at hann spældi, og har mátti hann við hvørt taka gittaran á nakkan og flýggja undan løgregluni, sum helt, at hann órógvaði friðin, men seinnu árini hevur hann bæði spælt til fínastu mentanartiltøk, til størri og smærri konsertir og festivalar.

Hanus G. Johansen dugir at fáa eina og hvørja áhoyrarafjøld at lurta eftir sær. Hann kann taka eina ørgrynnu av ymiskum sangum, og hann finnur altíð fram til kjarnina í einum tiltaki, so hann kann leggja nakað afturat tí – undirhalda og bergtaka.

## KUNDI VERIÐ HEIMSSTJØRNA

Tey, sum vóru til framførsluna hjá Hanusi á G! festivalinum fyri einum mánaði síðani, upplivdu, hvussu fantastiskt lagið er, tá ið Hanus er á pallinum. Stóru stjørnurnar úr útlandinum hava nógv gott við sær, tá ið tær koma til landið at spæla, og tað er stuttligt at uppliva kend nøvn á føroyskum palli.

Men. Og tað er sanniliga eitt men.

Vit eiga eisini stjørnur her á landi, sum kunnu mátast við tær bestu og bjartastu uttanlands. Og Hanus er ein teirra. Hann er ein vísusangari við formati, sum kundi verið komin langt uttanlands. Onkur tók so rívan til og segði, at Hanus kundi verið ein heimsstjørna, um hann bara vildi.

Men tað vil Hanus ikki. Hanus vil spæla, tá ið hann hevur hug at spæla og fyri teimum fólkum, sum hann hevur hug at spæla fyri. Hann er sín egni, og tað ger hann eisini til tað spennandi og hugtakandi upplivilsi, sum hann altíð er á pallinum.

## EINA OG Í BÓLKI

Hanus Gærdum Johansen vaks upp í Klaksvík, og hann var virkin í tónleikalívinum í Klaksvík í nógv ár. Hann spældi við í onkrum tónleikabólkum, og hann sang og spældi eisini sjálvur.

Tá ið Frændur fyrstu ferð fóru í studio í 1984 var Hanus Johansen við í bólkinum. Tað kom væl við hjá hinum sangarunum og tónleikarunum í bólkinum, at Hanus var við, tí hann hevði roynt studio áður, og einki kundi taka hann av fótum.

Hanus var við til at seta dám av fyrstu og aðru útgávuna hjá Frændum, og hann er millum annað at hoyra á sangum sum Hundurin Brúni og Friðarsangur.

Hanus hevur seinni árini eisini spælt nógv við einum øðrum bólki, og tað hevur verið eitt heilt annað slag av tónleiki. Hanus og Aldubáran góvu eina fløgu út, og samstarvið hevur eisini rokkið inn í Norðurlandahúsið og á aðrar føroyskar pallar.

Hanus er eitt av okkara størstu tónleikabegávilsum, og hann hevur verið framúr sum tulkari og tónasmiður. Men tá ið alt kemur til alt, so er Hanus helst allarbest sum Hanus – við einum gittara um hálsin á einum palli.

Og tað verður hann aftur í Klaksvík leygarkvøldið 14. august.

PÆTUR VIÐ KELDU

# Løg mær dámar sleppa við

**Pætur við Keldu hevur ofta leiklutin sum hann, ið fyrstur skal á pall. Hann er eisini millum tey , ið byrjar kvøldini á Summarfestivalinum í Klaksvík, og hann hevur onki ímóti hesum leikluti. Annars sigur Pætur, at talan verður um løg hjá øðrum og egin løg, men at fyrsta treyt er, at talan er um løg, ið honum dámar**



Pætur við Keldu hevur í longri tíð arbeitt við tilfari til eina nýggja fløgu og við at gera ætlanina til veruleika. Saman við Hans Poulsen, sum eisini framleiddi lagið »Som en drøm« til donsku prix-kappingina, hevur hann longi arbeitt við nýggjari fløgu, men ongin deadline er enn sett á ætlanina.

Hans Poulsen er bróður kenda Óla Poulsen og hevur fleiri ferðir prógvað, at hann eisini er sum tikin úr leikum, tá um tónleik og tónleikaframleiðslu ræður.

Um Summarfestivalin sigur Pætur:

– Talan verður um løg, ið mær dámar. Tað er líkasum markið fyri, hvat sleppur við á eina konsert hjá mær. Og talan er um løg hjá øðrum og egin løg.

Pætur er ofta fyrstur, tá hann spælir á konsert og Summarfestivalurin er onki undantak í so máta.

– Eg hugsi ikki um tað, men eg havi onki ímóti hesum leiklutinum. At spæla í Atlantis passar væl, møtvegis eini útikonsert, tí mær dámar væl undir taki og har ljósið er dempað, sigur Pætur við Keldu.

## STÍLBLAND

Og fólk skulu ikki vænta sær ein ávísan stíl, tá Pætur hesferð trínur á pall.

– Talan verður um ymiskt. Okkurt jazzkent, fólkatónleik og okkurt countrykent, hóast talan ikki júst er um countrytónleik, sigur Pætur, sum hevur eina fjølbroytta skrá.

– Enn er ikki leyst og liðugt við samansetingini av tónleikarum, men eg havi samband við ymisk og væntandi verða eisini ymsir sangarar, ið bæði syngja solo og sum hjálpa við korsangi, sigur Pætur við Keldu, sum tó nevnir nøvn á kendum og dugnaligum tónleikarum, sum hann nærum hevur fingið avtalu við um at vera við á pallinum, tá Summarfestivalurin fer av bakkastokki.



# – Tónleikur styrkir boðskapin

**– Eftir eina konsert í ítróttarhøllini í Havn minnist eg, at tað vóru so nógv fólk, sum vildu hava autograf frá mær, at eg var trýstur upp ímóti vegginum, og eg gjørdist næstan bangin av tí, sigur gospelsangarin Kjell Samuelson um eina av sínum ferðum í Føroyum. Nú kann hann aftur upplivast á føroyskum palli**



Svenski gospelsangarin Kjell Samuelson fer at spæla nýtt og gott gamalt, tá ið hann er við á gospelkonsertini á Summar Festivalinum. Hann gleðir seg nógv til at syngja aftur í Føroyum, her hann ikki hevur verið í átta ár

Kjell Samuelson er helst best kendur sum »ein av Samuelson brøðrunum«, men seinastu mongu árini hevur hann givið tónleik út sjálvur og spælt á konsertum og øðrum tiltøkum.

Kjell, Olle, Jard og Rolf mannaðu sera væl umtókta gospelbólkinum Samuelsons í 70'unum og 80'unum, og teir ferðaðust víða við sínum tónleiki. Í 1981 doyði Rolf, og hóast hinir tríggir hildu fram við bólkinum í eina tíð, so gjørdist hetta endin á bólkinum.

– Saknurin av Rolf gjørdist ov stórur hjá okkum, sum vóru eftir, og hjá áhoyrarunum, og tí góvust við aftaná nøkur ár og fóru at arbeiða við tónleiki hvør sær, sigur Kjell Samuelson.

## ÚR AT GERA

Hann hevur seinastu árini givið út fimm fløgur, har ein partur hevur verið sangir, sum hann sjálvur hevur skrivað. Hann er við á millum sjeyti og áttati møtum og konsertum í ár, og hann hevur verið í ella skal til lond sum Noreg, Danmark, Finnland, Estland, Russland og Føroya.

Harafturat hevur hann tvær útgávur á bakkastokki. Onnur er ein solofløgu við nýggjum sangum hjá sær sjálvum, og hendan fløgan fær heitið »Goda Nyheter«.

Hin útgávan er eitt fløgusett undir heitinum »Minns du sången - 40 sånger under 4 decennier med Samuelsons och Kjell & Rolf«.

## TÓNLEIKUR OG ORÐ HAVA ÁVIRKAN

*Hvat hevur tónleikur at siga fyri teg?*

– Tónleikur hevur sera nógv at siga fyri meg, eg kundi ikki hugsa mær eitt lív uttan tónleikin.

– Tónleikur kann skapa ein stemning, sum kann gera boðskapin lættari at vinna fram. Men tí er tað eisini umráðandi, at tónleikurin og boðskapurin hóska saman. Tónleikurin kann lata sinnið upp, men tónleikurin kann somuleiðis lata sinnið aftur, um fólki ikki dámar tónleikin.

– Tað riggar illa við hørðum og ágangandi rocktónleiki til ein boðskap um kærleika og náði. Hinvegin kann kristin rocktónleikur vakja andaliga sovandi persónar og fáa teir at lurta og hugsa. Talaða orðið kann tað sama, men orðið og tónleikurin saman hevur tvífalt so stóra ávirkan.

## NÓGVAR STÓRAR UPPLIVINGAR

*Hvat hevur tónleikin givið tær?*

– Eg havi funnið á máta at náa menniskju – ikki bara kristin trúgvandi, men kanska enn meira fólki, sum ikki halda seg verða religiøs, við evangelium. Árini við tónleiki hava eisini givið mær ein samleika, eg eri kendur av nøgvum fólki í ymiskum londum sum gospelsangarin Kjell Samuelson.

*Hvat hevur verið størsta upplivingin gjøgnum árini?*

– Tað er ein sera trupul spurningur. Tað er ikki bara tann eina størsta upplivingin, men heldur nógv stórar upplivingar. Til dømis at uppliva, hvussu ein sangur føðist innan í tær fyri síðani at verða spældur fyri fólki, sum dámar hann. Men hvørja ferð, at eg standi framman fyri fólki, sum lurtar og tekur ímóti mínum sangum og boðskapinum, er tað ein stór uppliving.

– Tónleikur hevur eisini ført meg til nógv áhugaverd og hugtakandi pláss kring heimin – til dømis til Føroya.

## STÚRDI FYRSTU TÍÐINA

*Hvussu hevur tú tað við at standa á einum palli?*

– Eg minnist frá fyrstu tíðini við Samuelson, at eg var sera stúrin fyri at fara at pallin, men við tíðini havi eg arbeitt tað burtur. Men eg kenni tó ein ávísan spenning, tá ið eg skal syngja fyri fólki, men eg upplivi tað positivt.

– Eg eri engageraður og vil hava nakað gott burtur úr, hvørja ferð eg eri á pallinum. Eg verði ongantíð líkagyldugur við mínum tónleiki.

## UM KONSERTIR Í FØROYUM:

Kjell Samuelson hevur síðani sjeytiárini javnan verið í Føroyum og sungið, og konsertirnar við Samuelson vóru stórhendingar her á landi. Tað eru tó liðin átta ár, síðani hann var her seinast.

– Tað hevur verið heilt ótrúligt at verið í Føroyum og sungið – bæði við Samuelsons í 70'unum og 80'unum og seinni, tá ið eg havi verið við mínum egna bólki. Eftir eina konsert í ítróttarhøllini í Havn minnist eg, at tað vóru so nógv fólk, sum vildu hava autograf frá mær, at eg var trýstur upp ímóti vegginum, og eg gjørdist næstan bangin av tí. Fyrst skrivaði eg mítt fulla navn, men eftir eini 200 autografar bleiv tað bara til »Kjell«.

– Fólk í Føroyum eru nakað serligt. Tey eru sera opin, hjartalig og gestablíð. Eg havi fingið nógvar góðar vinir í Føroyum, og eg gleði meg sera nógv til at koma aftur at vitja.

Í Klaksvík fer Kjell at spæla bæði nýggjar og gamlar sangir, og tað er lítið at ivast í, at størsta hittið hjá honum í Føroyum, Tro, håb og kærlek, eisini verður at hoyra.